## Danir vilja hava Fogh

Skuldi tað hent, at NATO vrakar danska forsætisráðharran, so hann ikki fær starvið sum aðalskrivari har, eigur hann at halda fram sum forsætisráðharri. Tað siga 54 prosent av teimum spurdu veljarunum í einari kanning, sum Gallup hevur gjørt fyri Berlingske Tidende. 22 prosent halda hinvegin, at vrakar NATO hann, eigur hann at leggja frá sær sum stjórnarleiðari. Formaðurin í SF, Villy Søvndal, sigur, at úrslitið av kanningini gevur eina góða mynd av, at nógvir danir ivast eitt sindur í Lars Løkke Rasmussen sum forsætisráðharra. Anders Fogh Rasmussen kunngjørdi í gár, at hann er valevni til starvið í NATO.



## DF gleðir seg til Løkke

Í Danska Fólkaflokkinum vóru tey fegin, tá Anders Fogh Rasmussen loksins váttaði, at hann er valevni til aðalskrivarastarvið í NATO. Pia Kjærsgaard segði í gjárkvøldið, at tað er gott fyri tað politiska veðurlagið á Christiansborg, at greiði er fingin á støðuni um forsætisráðharran og NATO-starvið. Hon segði samstundis, at hon gleðir seg til at arbeiða saman við Lars Løkkr Rasmussen, sum verður forsætisráðharri, um Anders Fogh Rasmussen fær NATO-starvið. Pia Kjøærsgaard viðgekk kortini, at hon er hørm um at siga verandi forsætisráðharra farvæl.

# Havstovan fekk tilsøgn um 10 miljónir krónur til nýtt rannsóknarskip



**Dagurin í gjár royndist væl hjá fyrrverandi Fiskirannsóknarstovuni, sum nú hevur fingið nýtt navn, nýggjan samleika – og eisini hevur fingið eina tilsøgn frá Forskotsgrunni Fiskiflotans upp á heilar 10 miljónir krónur til nýtt havrannsóknarskip**

MÓTTØKA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í gjár var stór móttøka og hátíðarhald á fyrrverandi Fiskirannsóknarstovuni, sum hin 1. apríl í ár hevði fimmti ár á baki.

Nógv fólk var samankomið í Nóatúni 1, blómur og gávur vórðu handaðar, og røður vórðu hildnar.

Dagurin í gjár var eisini dagurin, har stovnurin fekk nýtt navn og nýggjan samleika við nýggjum búmerki.

Navnið Fiskirannsóknarstovan fer við tíðini at fara í søguna, og nýggja navnið – Havstovan – verður tað, sum eftirtíðin fer at halda seg til.

Nýggja búmerkið er rundleitt, bláligt í erva og grønligt í neðra. Ímyndin er nakrir fiskar, sum svimja í havinum, summir størri, aðrir smærri.

Tað var landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, sum avdúkaði nýggja navnið og nýggja samleikan hjá stovninum.

Við hátíðarløtuna í gjár avdúkaði Jákup Sólstein, eisini, at ein grunnur, hann er formaður í, hevur samtykt at veita heilar 10 miljónir krónur í stuðli til bygging av nýggjum havrannsóknarskipi.

Sjálvur rópti Jákup grunnin við navninum Forskotsgrunnur Fiskiflotans, onkur annar rópti grunnin Forskotsgrunn Skipsfiskimanna.

Hetta er ein grunnur, sum fiskivinnan á havinum verður mett at eiga. Hann hevur áður ligið undir Lønjavningarstovuni, men er seinni loystur haðani og eigur sítt egna fæ.

Teir, sum umboða grunnin vegna sjóvinnuna, eru Jákup Sólstein, fyrrverandi formaður í Føroya Reiðarafelag, Óli Jacobsen, fyrrverandi formaður í Føroya Fiskimannafelag og Herman Bærentsen, sum eitt nú umboðar navigatørar og maskinmenn.

- Vit hava samtykt eina tilsøgn, sum gevur 10 miljónir krónur til nýtt havrannsóknarskip – tá og um henda verkætlan verður veruleiki. Hetta er ikki peningur, sum er í landskassanum, men í føroysku peningastovnunum. Fyri at peningurin kann veitast til samtykta endamálið, skal løgtingið samtykkja broytingar í reglunum fyri grunnin, segði Jákup Sólstein.

Umframt starvsfólk á stovninum, vóru nógv vinnuumboð, eins og umboð fyri stovnar og feløg við til móttøkuna. Slóðarin innan føroyskar havrannsóknir, Jákup Sverri Joensen og honum á baki, Andreas Reinert, vóru eisini við.



*Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, avdúkaði við móttøkuna í gjár nýggja navnið og búmerkið hjá stovninum, sum nú kallast Havstovan*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### 100 ár á baki

Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Havstovuni, segði, at havrannsóknir eru gjørdar undir Føroyum í meira enn 100 ár, og at tað júst í ár eru 100 ár síðan, at fyrsti toskurin varð merktur undir Føroyum.

Hesar rannsóknir vórðu serliga gjørdar av dønum og øðrum.

- Sambært ársfrágreiðing fyri 1959 er Fiskeribiologisk Laboratorium í Tórshavn opið alt árið, og vit síggja, at fíggjarárið 1959/1960 fer játtanin munandi upp. Tað er hetta árið, at Jákup Sverri Joensen kemur úr Danmark, og vit siga, at stovnurin fór undir sítt virksemi hin 1. apríl í 1959.

Hjalti í Jákupsstovu vísti á stóra týdningin av tí arbeiði, sum Jákup Sverri Joensen saman við øðrum og seinni í sínum starvi í Føroyum hevði gjørt innan havrannsóknir.

Hann segði, at stovnurin er nógv broyttur og mentur hesi ár, og hann vísti eisini á avrikssáttmálan, sum Havstovan nú hevur við Fiskimálaráðið, har ein partur leggur áherðslu á samstarvið millum fiskifrøði, politiskar myndugleikar og vinnu.

- Bæði Viberg Sørensen, formaður í Føroya Reiðarafelag og Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag, eru hjástaddir her í dag, og teir fara at bera fram heilsu. Hetta hevur sera stóran týdning fyri okkum, legði Hjalti í Jákupsstovu aftrat.

### Ikki mótpartur

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sum avdúkaði nýggja navnið og búmerkið hjá stovninum, vísti eisini til avrikssáttmálan, sum Fiskimálaráðið og Havstovan hava gjørt.

- Sáttmálin lýsir í stuttum málini, ið sett eru út í kortið, bæði tey, sum liggja nær og tey, sum liggja longri frammi, eins og tey yvirskipaðu málini.

Landsstýrismaðurin segði, at Havstovan er vorðin ein kendur stovnur kring um okkum og er avgjørt hin fremsti innan føroyska gransking.

- Í so máta er Havstovan mest virdi stovnur í landinum, legði Jacob Vestergaard aftrat.

Hann segði, at Havstovan eigur at metast sum ein stuðul og samstarvsfelagi – og ikki mótpartur – hjá fiskimonnum.

- Skyldan hjá báðum pørtum er stór, og ábyrgdin er ikki minni.

Jacob Vestergaard helt, at samstarvið millum fiskifrøði, fiskimenn og politikarar gongur rætta vegin, men enn restar nakað í, til fult forstáilsi er millum partarnar.

Landsstýrismaðurin segði, at projekteringin av nýggjum havrannsóknarskipi er liðug, og í fjør heyst samtykti løgtingið, at haldast skal fram við ætlanini at byggja hetta skip.

- Øll kenna fíggjarstøðu landsins og vita, at neyðugt er við raðfestingum, men vit leggja dent á týdningin av hesum skipi og vóna, at verkætlanin kann førast út í lívið, áðrenn ov long tíð er umliðin.

Jacob Vestergaard vísti eisini á týdningin av, at fiskifrøðiliga ráðgevingin hvílir á so tryggum grundarlagið sum gjørligt.

### Dugdi væl

Viberg Sørensen, formaður í Føroya Reiðarafelag, helt eina hugnaliga røðu, har hann eitt nú vísti á, hvussu hann fyrstu ferð hoyrdi nøvnini á Jákupi Sverra Joensen og Hjalta í Jákupsstovu nevnd.

- Sum blaðungur fór eg við pápa mínum, sum var línuskipari, við nýggjum línubáti til Eysturgrønlands. Á hesi ferðini løgu vit eisini